# Yvirgangur hóttir heimsfriðin

**USA er lýst í krígsstøðu og meginparturin av vesturheiminum er tilbúgvin í sambandi við, at ræðuligastu yvirgangsatsóknirnar í nýggjari tíð í gjár vórðu framdar móti USA**

YVIRGANGUR
*John Johannessen*

Tað var ein skelkur fyri allan heimin, tá sjónvarps- og útvarpsstøðir týsdagin stilláðu beinleiðis yvir á gøturnar í New York at siga frá, at tvey fløgfør høvdu rent beint inn í bæði tvíburatornini í World Trade Center.

Ruðulleikin byrjaði klokkan trý korter til níggju lokala tíð, tá eitt flogfar rendi beint inn í tað syðra av teimum báðum 410 metra høgu tvíburatornunum av World Trade Center.

Longu 18 minuttir seinni rendi næsta flogfarið í norðara tornið. Og nú var greitt, at talan ikki var um nakað óhapp, men um beinleiðis yvirgang.

Síðani ganga 52 minuttir, og meðan World Trade Center stendur í ljósum loga og ruðulleiki valdar í New York, frættist, at eitt triðja flogfar hevur rent seg inn í risa bygningin hjá Pentagon í stjórnarbýnum, Wasington



*Allur heimurin er á gosi eftir herviligu yvirgangsatsóknina, sum í gjár varð framd móti USA. Her síggja vit, tá eitt Boing 767 ferðafólkaflogfar verður rent inn í tað norðara av tvíburðatornunum í World Trade Center í New York*

### Tøma bygningar

Um hetta mundið verða allir almennir bygningar í meginpartinum av USA tømdir fyri fólk. Sjálvt Hvítu Húsini verða tømd, og tíðindi frættast um, at roykur kemur úr Hvítu Húsunum, og at ein bilbumba er brostin í parkeringskjallaranum í Uttanríkisráðnum. Men hesi tíðindini verða seinni avsannað.

Ruðulleikin er nú fullkomin – halda fólk. Men tað ganga ikki meira enn fimm minuttir, til syðra tvíburatornið í World Trade Center fellur saman sum eitt korthús og betong og stál fýkur yvir trongu gøturnar í miðjum New York. Hetta hendi klokkan 10.00 lokala tíð. Ein tíma eftir, at flogfarið rakti tornið.

Síðani ganga ikki meira enn 28 minuttir, til tað norðara tornið eisini dettur saman. Nú liggja tey bæði tornini, sum eru umleið 100 metrar hægri enn Beinisvørð, sorað í gøtunum í New York.

Og lítið bil seinni, hoyrist, at eitt fjóðra flogfar er dottið niður í ein landssynning úr Pittsburg í Pensylvania.

### Heimskreppa

Nú er fullkomin ruðulleiki. USA verður lýst í krígsrættarstøðu, og allur heimurin er á gosi um tað, sum er hent. Stjórnarleiðarar, bæði í Miðeystri og í vesturheiminum skunda sær at fordøma atsóknina móti USA.

Eingin veit, hvør hevur framt atsóknina, og stjórnarleiðarar meta støðuna so álvarsama, at full tilbúgving verður sett í verk. Hetta er eisini galdandi her heima í Føroyum, her Marinustøðin í Havn og Nato støðin í Mjørkadali eru fult tilbúnar, um nakað víðari skuldi hent.

Í skrivandi stund, beint fyri middag mikudagin føroyska tíð, er enn ikki greitt, hvør framdi atsóknina móti USA. Men amerikanski forsetin, George W. Bush, hevur lovað amerikanska fólkinum, at atsóknin skal verða hevnd. Og hann hevur eisini sagt, at londini, sum hýsa yvirgangskroppunum ikki skulu kenna seg trygg.

Amerikonsk bløð vita at siga, at fimm illgrunasamir arabar eru tiknir í USA við handbókum til flogfør hjá sær. Men enn er ikki greitt, um hesir hava samband við atsóknina. Tó siga tíðindastovur, at myndugleikarnir hava greiðar ábendingar um, at múgvandi yvirgangskroppurin, Bin Ladin, sum hevur lýst heilagt kríggj móti USA, hevur samband við atsóknina. bin Ladin goymir seg í Afganistan.

Bløðini í USA eru farin at leggja trýst á amerikanska forsetan um at hevna atsóknina, og í oddagrein mikudagin sigur Washington Post, at tjóðin miðvíst má fyrireika seg til aldarinnar fyrsta kríggj, ið byrjar við at finna og revsa, teir, ið stóu fyri hópdrápunum.

Færøernes Kommando herðir eftirlitið:

# Portrini stongd

**Øll tann danska verjan um alt ríkið hevur fingið boð um at herða eftirlitið við, hvør vitjar hernaðarstøðirnar. Í Føroyum merkist yvigangurin í USA soleiðis, at portrini til Færøernes Kommando eru stongd, og eftirlitið er hert**

EFTIRLIT
*Stefan í Skorini*

Eli Lyngvej-Larsen, sum er pressutalsmaður hjá Færøernes Kommando í Føroyum, sigur, at allar støðirnar hjá donsku verjuni hava fingið somu boð.

Tey siga, at øll skulu herða eftirlitið við teimum, sum vitja støðir og øki hjá danska herinum. Tað ber í sær, at tey skulu hava eyguni við óviðkomandi fólki og akførum, sum ætla sær inn á hernaðarøki.

Í Føroyum vil hetta siga, at portrini til økini hjá danska herinum í Mjørkadali og við Hoyvíksvegin í Havn eru stongd allan dagin. Vanliga hava hesi portrini verið opin í arbeiðstíð, men annars stongd.

Øll tey, sum hava ørindi á hesum økjum, skulu geva til kennar, hvørji tey eru, áðrenn tey fáa atgongd.

Orsøkin til hesi trygdartiltøk eru yvirgangsálopini á stjórnar- og skrivstovubygningar í USA, sum vórðu framd týsdagin, har túsundtals fólk hava latið lív. Danska verjan vil tryggja allar sínar bygningar ímóti álopum, sum kunnu koma fyri. Tí verður eftirlitið hert.

Annars sigur Eli Lyngvej-Larsen, at radarin á Sornfelli hevur vanligt eftirlit við loftrúminum við Føroyar, og hetta gongur sína dagligu gongd.



*Síðan yvirgangin í USA týsdagin hevur Færøernes Kommando hert eftirlitið við teirra støðir í Føroyum. Her er tað portrið til støðina við Hoyvíksvegin, sum er latið aftur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



# Óvissan ávirkar búskapin

**Í fyrstu syftu er tað stóra óvissan eftir yvirgangsálopið í USA, sum ávirkar partabrævamarknaðin og oljuprísin, men tað er ov tíðliga at gera nakra niðurstøðu, um hvussu hendingarnar fara at ávirka heimsbúskapin í longdini, sigur stjórin á Kaupthing**

BÚSKAPUR
*Eyðun Klakstein*



*Petur Holm, stjóri á Kaupthing, heldur ikki, at føroyski búskapurin fer at merkja stórvegis til hendingarnar í USA, men ein avleiðing kann verða, at oljuprísurin eisini fer at hækka hjá okkum*

Altjóða fíggjarheimurin reageraði ógvusliga eftir yvirgangsálopið í USA týsdagin, men enn er óvist, hvussu álopið fer at ávirka heimsbúskapin í longdini.

– Týsdagin var eina afturgongd í partabrævavirðinum, og orsøkin til var, at stór óvissa er um ymisk viðurskifti í amerikanska búskapinum eftir eina slíka hending, sigur Petur Holm, stjóri á Kaupthing.

Spurningurin er, hvussu slíkt yvirgangsálop fer at ávirka nýtsluna hjá privata brúkaranum, hvussu øktar verju- og trygdarútreiðslur fara at ávirka amerikansku fíggjarlógina og fyritøkur, og hvussu hugurin verður at gera íløgur í USA eftir álopið.

– Í løtuni er alt óvist, og tað ávirkar virðið á partabrøvunum, men tað verður ikki fyrr enn nakrar vikur eru gingnar, at tað ber til at siga, hvørjar búskaparligar avleiðingar yvirgangurin í USA fer at hava við sær, sigur Petur Holm.

Í gjár var partabrævamarknaðurin í New York afturlatin, so tað bar ikki til at siga, hvussu hann var ávirkaður av álopinum týsdagin.

### Oljuprísur fór upp

Hendingin týsdagin ávirkaði ráoljuprísin, sum fór munandi upp. Beint eftir álopið í New York fór prísurin upp við 1, 75 dollarum fyri tunnuna, og tað fekk prísin at nærkast teimum 30 dollarunum fyri tunnuna.

– Hvørja ferð illgruni er um, at ein hending ella støða kann ávirka Miðeystur á onkran hátt, so hækkar oljuprísurin. Vísir tað seg, at okkurt land í Miðeystri er uppi í álopinum á USA, so fer tað at merkja hægri oljuprísir, sigur Petur Holm.

– Vísir tað seg hinvegin, at Miðeystur einki hevði við hendingarnar at gera, og tað til dømis er Afghanistan, sum er uppi í, so fer tað ikki at fáa somu ávirkan á oljuprísin, sigur stjórin á Kaupthing.

Hann heldur ikki, at føroyski búskapurin fer at merkja stórvegis til hendingarnar í USA, men ein avleiðing kann verða, at oljuprísurin eisini fer at hækka hjá okkum.

– Tað kann eisini fara at vísa seg, at tað verður amerikanski búskaparin, sum fer at merkja avleiðingarnar, meðan eitt nú tann europeisku búskapurin – so løgið tað ljóðar – fer at hava fyrimunir av álopinum, sigur Petur Holm.

Hann leggur tó dent á, at í løtuni er stór óvissa um búskaparligu avleiðingarnar, og tað verður ikki fyrr enn ein tíð er fráliðin, at tað ber til at siga ítøkiligt, hvørjar avleiðingarnar eru.

# Samráðingarnar um løgreglu útsettar

**Høgni Hoydal hevur í sambandi við yvirgangsatsóknirnar í USA biðið um at fáa útsett samráðingarnar, sum í gjár skuldu vera við danska løgmálaráðharran um yvirtøku av løgregluni**

YVIRGANGUR
*John Johannessen*

Fundurin, sum í gjár skuldi vera millum danska uttanríkisráðharran, Frank Jensen, og Høgna Hoydal um yvirtøku av løgregluni, er útsettur til 26. september.

Tað er Høgni Hoydal sjálvur, sum hevur tikið stig til at útseta fundin.

»Eg havi sjálvur skotið upp at útseta fundin, tí eg haldi tað vera rættast og virðiligast at lata orkuna og tankarnar dvøla við skelkandi sorgarleikin í USA, sum upptekur øll fólk og allar myndugleikar í heiminum«, sigur Høgni Hoydal í tíðindaskrivi.

Fundurin hevði helst kortini verðið avlýstur, tí Frank Jensen er við í serligu trygdarnevndini, sum er sett í sambandi við, at Danmark er tilbúgvið.

## Løgmaður sýnir samkenslu

**Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur sent amerikanska forsetanum samkenslufjarrit í sambandi við yvirgangsatsóknirnar móti USA**

YVIRGANGUR
*John Johannessen*

– Føroyska fólkið ynskir at sýna tær og amerikanska fólkinum okkara djúpastu í sambandi við yvirgangsatsóknirnar. Eg ynski tær, harra forseti, og øllum fólkinum í USA Guðs signing og styrki í komandi tíðum.

Soleiðis sigur Anfinn Kallsberg, Føroya Løgmaður, millum annað í samkenslufjarriti til George W. Bush, forseta USA.

# Enn eitt álop við knívi

**Havnarfólk upplivdu enn eitt álop við knívi týskvøldið. Ein drongur var skorðin fleiri ferðir í andlitið, og okkurt bendir á, at hetta álopið hevur samband við hendingina í badmintonhøllini**

HARÐSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Innan trígjar dagar eru tvey álop við knívi farin fram í Havnini. Báðu ferð er talan um ógvuliga grovan harðskap. Og tað eru heilt ungir dreingir, ið standa fyri hesum álvarsomu álopum.

Týskvøldið spákaði ein 15 ára gamal drongur undir Glaðsheyggi. Brádliga koma átta (8) ungir dreingir og leggja á tann einsamalla drongin. Hann verður skorðin einar ellivu ferðir í andliti og bløðir illa.

Teir átta gerningsmenninir vóru allir í svørtum klæðum og høvdu elefanthúgvur, sum fjaldu andlitini. Løgreglan heldur, at teir eru í aldrinum 15-18 ár.

Líkt er ikki til at álopið er framt spontant, men at tað er lagt til rættis frammanundan. Tann álopni gongur vanliga á hesum leiðum, og tá teir átta dreingirnir síggja tann 15 ára gamla, fara teir at ganga skjótari og fanga hann at enda.

Hann verður hildin niðri, meðan ein drongur skerð hann í andlitið. Tað eftir øllum at døma ein ólógligur springknívur, sum er nýttur í hesum álopinum. Drongurin varð hildin í einar trígjar minuttir, áðrenn dreingirnir fóru avstað, sum um einki var hent.

Tey umleið ellivu sárini drongurin fekk, eru ikki serliga djúp, og tí er hann ikki innlagdur á sjúkrahúsið. Hann bløddi tó illa.

### Fekk hóttan

Løgreglan sigur við Sosialin, at tann álopni fekk eitt SMS um fartelefonina nakað fyrr um dagin. Hetta boðið varð sent um internetið, og tí ber ikki til at siga uppá standandi fót, hvør hevur sent tað. Kanska Føroya Tele hevur ein møguleika at spora hetta boðið.

Hetta var eitt hóttandi boð, men løgreglan vil ikki siga, hvat stóð í hesum boðnum, drongurin fekk.

Tann álopni er vinmaður við tann drongin, sum framdi álopið uppi í badmintonhøllini leygarkvøldið, tá ein drongur misti sjónina í øðrum eyganum. Tí er okkurt, sum bendir á, at hesi bæði álopini hava samband hvørt við annað. Løgreglan vil tó ikki vátta, at so er.

Jón Klein Olsen, støðleiðari, sigur, at løgreglan hevur ávísar persónar í kikaranum, sum teir hava illgruna um.

Dreingirnir ferðast í sama umhvørvið, og tað er onkur innan hetta umhvørvið, sum skal geva løgregluni upplýsingar um álopið ella gerningsmennina.


